# »Við heimsins dyr – nýggj fløga við Kára Sverrissyni

FLØGUÚTGÁVA
*Tutl*

»Við heimsins dyr« eitur ein nýggj fløga, ið júst er komin í handlarnar. Tað er Kári Sverrisson, ið stendur fyri útgávuni og sum eigur flestu orðini og løgini á fløguni. Tóroddur Poulsen eigur eina yrking á fløguni og Agnar Lamhauge hevur gjørt eitt lag.

Tónleikarar á fløguni eru Kári Sverrisson, ið syngur og spælir gittar og onnur ljóðføri, Unn Paturson, ið syngur, Óli Olsen, ið spælir ljómborð og klaver, Agnar Lamhauge, ið spælir bandleysan el-bass, Mikael Blak, ið spælir kontrabass, Brandur Jacobsen, ið spælir trummur, og Eyðun Lamhauge, ið spælir harmoniku.

Fløgan er tikin upp í Saltangará og í Havn og er margfaldað og prentað í Týsklandi. Marius Olsen hevur gjørt permumyndina, Justin Philbrow hevur sett húsan upp, Jónheðin Tróndheim hevur staðið fyri parti av upptøkunum og hevur mastrað fløguna. Tað er plátufelagið Tutl, ið gevur út.




# Danskir ráðharrar til Føroya





*Per Stig Møller og Hans Chr. Schmidt koma til Føroya á hvør sína stutta vitjan í ár*

**Danski uttanríkisráðharrin, Per Stig Møller, og Hans Chr. Schmidt, danskur umhvørvismálaráðharri koma til Føroya seinni í ár**

VITJAN
*Heri á Rògvi*

Seinni ár fær føroyska heimastýri fleiri ráðharravitjanir úr ríkisfelaginum Danmark.

24. til 26. juni kemur sjálvur forsætisráðharrin at vera gestur hjá løgmanni á einari almennari vitjan. Danski forsætisráðharrin fer væntandi at fjakka eitt sindur runt í landinum, tá talan er um eina almenna vitjan, har kona forsætisráðharrans eisini er við.

Fyrst í mai kemur Per Stig Møller eisini til Føroya. Per Stig Møller er danskur uttanríkismálaráðharri og fyrrverandi formaður í Det Konservative Folkeparti. Hann hevur nógv at sæð og hoyrt til í sambandi við formansskapin hjá Danmark í ES og í sambandi við spentu støðuna viðvíkjandi Irak.

Talan er um eina regluliga vitjan, ið danski uttanríkismálaráðharrin plagar at gera til Føroya. Vanligt hevur verið, at danski uttanríkisráðharrin kemur til Føroya eina ferð um árið, men tað eru summi ár, har hetta dettur burturímillum.

Hetta er fyrsta vitjanin hjá Per Stig Møller sum uttanríkisráðharri í Føroyum. Hann gjørdist ráðharri á heysti 2000.

Sum uppfylging av yvirtøku av havumhvørvismálum er ætlanin, at danski umhvørvismálaráðharrin, Hans Chr. Schmidt, kemur til landið síðst í apríl mánaði.

Hetta er kortini ikki heilt vist, men arbeitt verður við ætlanini.

Eftir ætlan skal ein samstarvsavtala gerast millum danir og føroyingar. Talan skal vera um fakligt samstarv av ymsum slagi.

# Gott ár hjá Kaupthing

**Frá at vera ein íslendskur íløgubanki burturav, er Kaupthing nú at rokna sum ein av miðalstóru norðurlendsku íløgubankunum**

FÍGGJARHEIMUR
*Jákup Mørk*

280 mió.kr. rætta vegin. Tað vísti niðasta linjan á roknskapinum hjá Kaupthing, sum fyri stuttum varð almannakunngjørdur. Hóast eitt slíkt tal ikki ljóðar av so ótrúliga nógvum í fíggjarheiminum, so er einki at ivast í, at ánararnir av íløgubankanum eru serstakliga væl nøgdir við úrslitið.

## Stórur vøkstur

Seinastu trý árini hevur Kaupthing nevnliga verið fyri einum øgiligum vøkstri. Frá at vera ein íslendskur banki mest sum burturav, er talan í dag um eitt íløgufelag, sum hevur fingið fótin fastan í norðanlondum. Ein ætlan, sum varð løgd fyri fýra árum síðani, og sum longu nú hevur borið ávøkst.

Tað er í dag bert Noreg av norðanlondum, har Kaupthing ikki hevur deild, og harumframt hevur felagið í dag deildir í London, New York og Luxemburg.

At Kaupthing í 1999 gjørdi av at økja um virksemið komst annars av eini sera einfaldari orsøk. Mett varð, at íløgubankin hevði fingið somikið gott tak á íslendska marknaðinum, at møguleikarnir fyri framhaldandi vøkstri vóru ógvuliga avmarkaðir. Ein strategi um miðvísa ekspansión í grannalondunum varð løgd, og tó at hendan hevur gingið skjótt fyri seg, so merkir hetta ikki, at felagið á nakran hátt tykist hava spent so ov nógv út.

Solvensprosentið hjá fyritøkuni er framvegis 14,7%, sum er væl hægri enn tey lógarkravdu átta prosentini. Fíggjarstøðan javnvigar við á leið 18 mia.kr., harav eginpeningurin er 1,8 mia.kr., so tølini benda í allar mátar á eina væl rikna fyritøku. Hjá Kaupthing starvast í dag 539 fólk, harav 200 eru í Íslandi.

## Misjavnt hjá íleggjarum

Hóast góða úrslitið hjá fyritøkuni, so er tó nakað misjavnt, hvussu árið hevur roynst hjá íleggjarunum. Seiansta góða árið hevur verið serstakliga vánaligt á partabrævamarknaðinum, og tað merkir sjálvandi, at hjá teimum, sum hava stóran part av virðum sínum í hesum slag av virðisbrøvum, hevur árið ikki verið nakað serligt. Hinvegin hava tey meira tryggu lánsbrøvini staðið seg munandi betri, so fyri íleggjararnar er avgerandi, hvussu vágin í íløgunum er spjaddur.

Tað skal tó leggjast afturat, at íslendski partabrævamarknaðurin als ikki hevur merkt eins nógv til niðurgongdina, sum stóru marknaðirnir í eitt nú USA og London, so tað hevur eisini týdning, hvussu einstøku partabrævsíløgurnar eru spjaddar.

## Nøgd eftir umstøðunum

Og tølini benda í øllum førum eisini á, at hóast truplu støðuna, sum fíggjarmarknaðurin hevur verið í seinasta hálva annað árið ella so, so eru fólk framvegis áhugað í íløguvirkseminum hjá bankanum.

Ein av deildunum hjá Kaupthing er deildin í Havn. Har er ársroknskapurin enn ikki almannakunngjørdur, men stjórin, Peter Holm, sigur tó, at úrslitið neyvan verður heilt av leið.

- Eg kann siga somikið sum tað, at vit ikki koma út við einum halli. Sjálvandi hevði tað verið ynskiligt, um talan hevði verið um munandi yvirskot, men umstøðurnar hetta seinasta árið hava verið burturav vánaligar í fíggjarheiminum. Og tí má tað partvíst sigast at vera nøktandi, at vit koma við einum lítlum yvirskoti, heldur Peter Holm um virksemið hjá Kaupthing í Føroyum.



# Karsten Hansen væntar at lønarkrøvini verða lagalig

**Tað er væl ongin sum í fullum álvara hugsar sær, at lønarhækkingarnar fara at vera líka stórar í ár, sum tær hava verið tær báðu seinastu ferðirnar, sigur Karsten Hansen, landsstýrismaður í fíggjarmálum**

LØNARSAMRÁÐINGAR
*Áki Bertholdsen*



*Eg ivist ikki í, at innast inni eru fakfeløgini samd við mær í, at endamálið má vera at varðveita framgongdina, sigur Karsten Hansen. Hann er farin at brynja seg til samráðingar í heyst, men hann væntar lagaligari krøv hesuferð*

– Sjálvandi vænti eg, at fakfeløgini fara at seta lønarkrøv. men eg vænti heilt avgjørt, at tey fara at vera lagaligari í sínum krøvum í ár, enn tey hava verið tær báðu seinastu ferðirnar vit samráddust.

Karsten Hansen er so smátt farin at brynja seg til samráðingarnar, sum verða við fakfeløgini í heyst, tá ið sáttmálarnir við fleiri fakfeløg hjá teimum alment løntu ganga út 1. oktober.

Og tað skilst á øllum brøgdum, at hann væntar sær eina lættari uppgávu hesuferð, enn hann hevði tær báðu seinastu ferðirnar hann samráddust, tí tær ferðirnar vóru samráðingarnar bæði harðar og drúgvar við verkfalli og blokadum og hvøssum skuldsetingum.

Karsten Hansen sigur, at hinar ferðirnar, hann hevur samráðst, hevur hann staðið mótvegis lønarkrøvum uppá 50 - 100 og onkuntíð enntá 200 %.

– Tað sigur seg sjálvt, at slík krøv kunnu ikki vera tikin í álvara. Og eg vænti mær avgjørt, at lønarkrøvini vera lagaligari og betri undirbygd hesuferð, enn tey vóru tá.

## Skal speglast aftur

Eitt, sum hann byggir tað á, er, at bæði í ár og næsta ár verður skatturin lækkaður.

– Skattalættin ger, at eitt húski, har maður og kona forvinna 180.000 - 250.000 krónur í part um árið, fær einar 10.000 krónur meiri til taks í 2004, enn tey hava nú, sigur Karsten Hansen.

Og hann ivast ikki í, at tað fer at speglast aftur í lønarkrøvunum hjá fakfeløgunum í ár.

Hann vísir eisini á, at tær báðu seinastu ferðirnar hava samráðingarnar verið eitt undantak, tí lønirnar vóru so nógv afturútsigldar í kreppuárunum.

– Hesi seinastu fýra árini hava fakfeløgini fingið so stórar lønarhækkingar, sum tey ikki hava fingið fyrr í søguni. Og tað er væl ongin, sum í fullum álvara væntar, at lønarhækkinganar skulu vera líka høgar hesuferð, serliga tá ið skattalættin eisini verður havdur í huganum, sigur landsstýrismaðurin í fíggjarmálum.

Samstundis eru lønirnar nú komnar upp á eitt rímiligt støði, eftir at tær hava verið afturútsigldar í kreppuni og eisini tað eigur at tálma krøvini, leggur hann afturat.

Karsten Hansen leggur dent á, at tað er ikki so, at hann heldur, at Føroyar skulu vera eitt láglønarsamfelag.

Tí er tað heldur ikki so, at hann als ongi lønarkrøv væntar sær at fáa, tá ið samráðingarnar vera. Men tað skal vera máti við og tað, sum hann hevur staðið mótvegis tær báðu seinastu ferðirnar kann ikki takast í álvara, serliga nú skatturin er lækkaður.

Samstundis er prístalið ikki hækkað í tvey ár, so fólk hava munandi meiri til nýtslu nú, enn tey høvdu fyri heilt fáum árum síðani.

## Eru samd innast inni

Men nú tvíhalda fakfeløgini um, at skattalætti og lønarsamráðingar eru hvør sítt, sum als onki hava við hvørt annað at gera og sum als ikki skulu samanblandast.

– Eg vænti avgjørt ikki, at nakað fakfelag er so stívrent, at tað ikki viðurkennir, at ein skattalætti uppá 10.000 krónur til eitt húski ikki eigur at gera, at lønarhækkingarnar verða tálmaðar. Tað er heilt burturvið hjá fakfeløgunum at siga, at vit heilt skulu síggja burturfrá einum skattalætta.

Í veruleikanum ivast Karsten Hansen ikki í, at innast inni eru fakfeløgini samd við honum í hesum.

– Men tey skulu reka fakfelagspolitikk og formliga kenna tey seg kanska noydd til at hava hesi sjónarmiðini.

– Men tá ið samráðingarnar eru, ivist eg onga løtu í, at tey fara at tálma lønarkrøvini hesuferð, sigur almenni samráðingarleiðarin.

Og hann leggur afturat, at tað eru eisini onnur viðurskifti í sáttmálanum enn tey, sum hava við løn at gera, so tað er nokk at samráðast um.

Fakfeløg siga, at tað er ongin meining í, at lækka skattin, men so at hækka ymisk brúkaragjøld ístaðin. Hesin politikkur fer kanska tvørturímóti at herða lønarkrøvini, tí fyrr betalti hvørt húski eitt lítið sindur til ymisk endamál yvir skattin, men nú skulu tey betala beinleiðis brúkaragjøld?

– Eg veit ikki, hvat tað er fyri brúkaragjøld, øll tosa um. Tað er rætt, at sjónvarpsgjaldið er hækkað 500 krónur um árið og at ferðaseðlarnir við Strandferðsluni eru hækkaðir eitt sindur fyri fyrstu ferð í eini 10 ár. Onnur brúkaragjøld veit eg ikki um. Barnaburðargrunnur er settur á stovn, men mær vitandi var tað eitt krav frá fakfeløgunum og samstundis er ALS gjaldið munandi lækka.

– Samstundis er tað blivið dýrari at hava børn í ansing. Men nógvar av teimum príshækkingum, sum hava verið, eru beinleiðis avleiðingar av, at lønirnar hækka. Tá ið lønarhækkingar eru, hækka lønirnar hjá petagokum eisini og tí verður tað sjálvsagt dýrari at hava børn í ansing.

– Tað sigur seg sjálvt, at tá ið lønir fara upp, verður dýrari at fáa arbeiðið gjørd og tí dyrka ymisk gjøld eisini.

Karsten Hansen sigur nú heldur hann, at samráðingarnar skulu vera í virðing fyri hvørjum øðrum og hann ivist ikki í, at báðir partar fara at vísa vit og skil fyri at forða fyri, at vit koma aftur í somu støðu, sum vit vóru í frammanundan við kreppu, uppsagnum og arbeiðsloysi, tí tað vil ongin hava. – Endamálið við lønarsamráðingum má vera at varðveita framgongdina, sigur Karsten Hansen.

# Finleif aftur í Smiðjuni



*Finleif Mortensen avmyndaður omanfyri Argir við útsýni yvir Nólsoyarjørð. Nólsoyarfjørður er eisini heitið á myndini, hann stendur við og hon er eisini við á framsýningini, sum letur upp í Smiðjuni í Lítluvík í dag*

**Í dag letur Finleif Mortensen listaframsýning upp í Smiðjuni í Lítluvík við málningum, sum eru kveiktir úr føroyskum bygdarlagi og føroyskari náttúru**

LISTAFRAMSÝNING
*Áki Bertholdsen*

Tað er ikki so ofta, at Finleif Mortensen letur frætta frá sær.

Men í dag letur hann listaframsýning upp í Smiðjuni í Lítluvík.

Framsýningin letur upp klokkan 15 í dag og er opin til hósdagin 6. mars. Opið er hvønn dag frá klokkan 14 til 19, men í morgin, leygardagin, er opið frá klokkan 10 til 13 og so aftur frá klokkan 14 til 19.

Finleif Mortensen er ikki tann listamálari, ið hevur framsýningar í heilum. Hjá honum er listin frítíðarítriv afturat vanliga arbeiðnum sum radiomekanikari, so hon kemur í aðru røð.

Fyrstu ferð, hann vísti fram, var á eini ólavsøkuframsýning í 1982, sum tað árið var í Kommunuskúlanum.

Síðani hevur hann verið á fleiri øðrum ólavsøkuframsýningum eisini.

Í 1987 var hann fyrstu ferð í Smiðjuni og sama árið var hann eisini við á eini felags framsýning í Norðurlandahúsinum í Havn, saman við 4-5 øðrum.

Síðani hevur hann verið í Smiðjuni tvær ferðir afturat, í 1991 og í 1997, og hann hevur eisini verið við á einari várframsýning, umframt at hann nakrar ferðir hevur sýnt fram hjá Lions Klubbinum í Eysturoy.

Nú hevur hann havt ein drúgvan steðg, men nú leggur hann so til brots aftur.

Við á framsýningini í Smiðjuni eru 20 málningar og teir eru allir nýggir, málaðir teir seinastu fýra mánaðirnar.

Finleif Mortensen er kveiktur av føroyska bygdarlagnum og føroysku náttúruni. Hann flytir seg meiri og meiri tann abstrakta vegin, tó at tað sæst, hvat tað er, hann málar og litirnir eru heitir og fjálgir.

VIT LATA UPP
í nýggjum hølum í morgin
PIFF · PAFF · PUFF
opið verður frá 10 - 17